LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið
Tingshúsvegur 1-3
100 Tórshavn

**Svar**
**uppá**

**Skrivligan fyrispurning nr. 46/2017 eftir tingskipanini §52 til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Edmundi Joensen, løgtingsmanni, um avtalu millum Føroyar, Ísland og Grønland – vísandi til uttanríkispolitisku heimildarlógina.**

**Fyrispurningurin er soljóðandi**

1. Var talan um, at landsstýrismaðurin hevði undirskrivað formliga avtalu við Ísland og Grønland ? Hvørjar ásetingar í avtaluni vísa, at henda er ein formliga bindandi avtala ?

2. Ella var talan um, at landsstýrismaðurin hevði undirskrivað eina politiska yvirlýsing ? Hvørjar ásetingar í avtaluni vísa, at henda er ein politisk yvirlýsing uttan formligar bindingar?

3. Hevði landsstýrimaðurin samskift og samstarvað við ríkismyndugleikan um málið eftir uttanríkispolitisku heimildarlógini?

4. Kann ein landsstýrismaður mótmæla og nokta fyri at møta á fundi, har landsins áhugamál eru til viðgerðar og framvegis metast at umsita á fullgóðan hátt?

5. Hvat segði umsitingin hjá landsstýrimanninum um málið ? Hvørji ráð fekk hann frá umsitingini?

Tinganes • FO-100 Tórshavn • Faroes
Tel: (+298) 306000 • Fax: (+298) 306015 • e-mail: lms@lms.fo • www.lms.fo

**Svar**

**Til spurning 1**
Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum undirritaði Útnorðuravtaluna. Tað eru bert ásetingarnar um ígildskomu, og um hvussu hon kann verða sett úr gildi, ið kunnu geva ta fatan, at talan er um eina formliga avtalu.

**Til spurning 2**
Útnorðuravtalan er innihaldsliga ikki annað enn ein yvirlýsing um ætlað nærri samstarv. Hon inniheldur ikki nakrar veruligar bindingar, men einans eina semju um, at ráðharrarnir skulu hittast árliga, umframt at ein arbeiðsbólkur skal umsita avtaluna við tí endamáli at virka fyri styrktum samstarvi landanna millum, herímillum at gera tilmæli um møguligt nærri samstarv.

**Til spurning 3**
Nei. Avtalan varð hvørki av landsstýrinum ella av grønlendska landsstýrinum mett at vera ein altjóðarættarligur sáttmáli sambært uttanríkispolitisku lógini, og varð handfarin hareftir.

**Til spurning 4**
Tað kunnu vera ymiskar meiningar um, hvørt tað var rætt at fara á fundin í Keypmannahavn tann 1. desember ella ikki. Landsstýrismaðurin valdi ikki at fara. Tað hevur ikki givið mær orsøk til at halda, at landsstýrismaðurin ikki umsitur sítt málsøki á fullgóðan hátt,

**Til spurning 5**
Tað er landsstýrismaðurin, sum myndar ráðið úteftir og stendur til svars fyri tær avgerðir, sum verða tiknar.

Í Tinganesi, 16. februar 2018

Aksel V. Johannesen
Løgmaður